UTTAN ÚR HEIMI

## Skuldsettur fyri svik

Ríkasti maður í Russlandi, Mikhail Khodorkovskij, skal sita í varðhaldi í Moskva til tann 30. desember. Hann varð tikin í býnum Novosibirsk leygarmorgunin og fluttur til Moskva. Har gjørdi ein dómstólur av at varðhaldsfongsla hann.

Russiska ákæruvaldið vil vera við, at Mikhail Khodorkovskij, sum er stjóri í oljufelagnum Yukos, hevur snýtt tað almenna. Tá hann kom fyri rættin leygardagin, varð hann skuldsettur fyri skattasvik, skjalafalsan og fíggjarundandrátt fyri tilsamans hálva sjeyndu milliard krónur.

Nógvir eygleiðarar í Russlandi halda, at ríkmaðurin er tikin, tí hann fíggjar tveir politiskar flokkar, sum eru ímóti politikkinum hjá Vladimir Putin, forseta og stjórnini í Moskva. Sjálvur hevur Putin einki sagt um handtøkuna, men eygleiðararnir siga, at løgreglan hevði ikki kunnað tikið ein so týðandi persón uttan samtykki forsetans. Aðrir eygleiðarar ávara samstundis um, at handtøkan fer uttan iva at skerja áhugan hjá útlendskum fyritøkum at gera íløgur í Russlandi.

## Gott úrslit hjá Statoil

Tað gongur væl hjá norska oljufelagnum Statoil. Í gjár almannakunngjørdi felagið roknskapin fyri juli ársfjórðing, og har sást, at felagið hevði havt góðar tólv milliardir norskar krónur í avlopi í triðja ársfjórðingi. Tað er næstan hálvonnur milliard krónur meiri enn í sama tíðarskeiði í fjør.

Úrslitið hjá Statoil var eisini betur, enn serfrøðingar høvdu væntað. Í einum tíðindaskrivi, sum kom í sambandi við roknskapin, sigur felagið, at teir seinastu mánaðirnir hava verið truplir, og víst verður á gøluna, sum endaði við, at stjórin, Olav Fjell, noyddist at fara frá.

Aftan á skatt var nettoúrslitið í juli ársfjórðingi 4,3 milliardir norskar krónur. Tað merkir, at nettoúrslitið níggju teir fyrstu mánaðarnar var 12,3 milliardir krónur.

## Sharon til avhoyringar

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, skal seinni í vikuni í rættin í sambandi við tvey mál um svik.

Millum annað skal Sharon svara spurningum frá løgregluni, sum vil vera við, at forsætisráðharrin fekk eitt ólógligt lán undir valstríðnum í 1999. Hann skal hava fingið lánið sum samsýning fyri nakrar politiskar tænastur. Eisini er hann skuldsettur fyri at hava givið einum vinnulívsmanni mutur, tá hann var uttanríkisráðharri í nítiárunum. Sjálvur sigur Sharon, at hann er ósekur.

Sharon verður væntandi avhoyrdur í morgin og hósdagin. Hann er kortini ikki tann fyrsti ísraelski stjórnarleiðarin, sum er lagdur undir svik. Bæði Benjamin Netanyahu og Ehud Barak vórðu í síni tíð lagdir undir svik, men tey bæði málini vórðu seinni løgd til viks.

## Fyrireikaðu seg í fimm ár

Týska tíðarritið Der Spiegel avdúkar nú, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda fór undir at fyrireika atsóknina at Woeld Trade Center og Pentagon longu í 1996. Longu tá høvdu teir valt dagin, og tí høvdu teir givið atsóknini loyniliga heitið "Porche 911".

Sambært tíðarritinum var tað Osama bin Laden sjálvur, sum fekk hugskotið at nýta ferðamannaflogfør sum vápn. Der Spiegel veit eisini at siga, at yvirgangsmenninir ætlaðu ikki at stoyta tað fjórða flogfarið niður í Hvítu Húsini, sum tey flestu hava hildið, men at Capitol Hill var tað fjórða álopsmálið. Tað er har, Kongressin heldur til. Hetta flogfarið kom tó ikki so langt, tí tað datt niður í Philadelphia.

Sambært Der Spiegel var tað bin Laden, sum valdi menninar, sum skuldu taka lut í atsóknini,. Tað var í februar í 2001. Fimm mánaðir seinni, í juli í, var alt komið upp á pláss. Tá skal ein av flogskiparunum hjá al-Qaeda, Mohammed Atta, hava boðað frá, at "Porche 911 er til reiðar at seta í gongd", skrivar Der Spiegel.



*Umleið 400 hús eru farin upp í royk í Kalifornia seinastu dagarnar*

Mynd: Reuters

# Kalifornia brennur

**Ellivu fólk eru deyð, og minst 400 hús eru farin upp í royk í Kalifornia. Myndugleikarnir halda, at eldurin er ásettur**

ELDUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Gray Davis, sum enn er guvernørur í Kalifornia, hevur lýst undantaksstøðu í tveimum pørtum av statinum, og hann hevur biðið George W. Bush, forseta lýsa økini í undantaksstøðu. Sambært guvernørinum er hetta tann ringasti eldurin, sum hevur verið í Kalifornia seinastu tíggju árini.

Eldurin hevur serliga gjørt um seg á leiðini við býin San Diego. Har eru umleið 100.000 hektarar svidnir av, og átta fólk har eru deyð, sigur løgreglan í býnum. Tvey teirra doyðu, tá tey royndu at flýggja undan eldinum í bili, ein maður doyði, tá hann royndi at bjarga húsunum, og ein annar maður fekk hjartaslag, meðan hann stóð og hugdi at húsum sínum, sum stóðu í ljósum loga.

Eisini eystan fyri stórbýin Los Angeles hevur eldurin gjørt stóran skaða, og har royna umleið 20.000 sløkkiliðsmenn at basa eldinum. Reyði Krossur hevur skipað tjúgu neyðhjálparstøðir í Kalifornia fyri at hjálpa fleiri túsund fólkum, sum hava verið noydd at flýggja undan eldinum.

Nógvur vindur av skiftandi ættum hevur gjørt tað sera trupult hjá sløkkiliðunum at forða eldinum í at breiða seg, og í gjár søgdu veðurmenninir framvegis frá vindi teir næstu dagarnar. Tað hevur eisini verið turt leingi, og harafturat hevur tað verið heitt leingi. Tað ger, at at kalla alt brennur, siga sløkkiliðini.

Løgreglan í Kalifornia heldur, at eldurin er ásettur.

# Irak líkist Vietnam

**Republikanski senatorurin John McCain heldur, at trupulleikarnir hjá amerikanska herinum í Irak líkjast teimum, sum herurin hevði í Vietnam á sinni**

IRAK-KRÍGGIÐ

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

John McCain leggur nú floksfelagan George W. Bush, forseta undir at undirmeta trupulleikarnar í Irak, og hann vil eisini vera við, at amerikanski almenningurin fær ov lítið at vita um tað, sum hendir í Irak.

- Fyri fyrstu ferð dugi eg at síggja, at eins og undir krígnum í Vietnam er líka lítið samsvar ímillum tíðindini úr Irak og tað, sum veruliga hendir har, sigur McCain, sum sjálvur var hermaður í Vietnam-krígnum.

Hann heldur kortini ikki, at støðan í Irak er tann sama sum í Vietnam á sinni, men amerikanski herurin hevur ein stóran trupulleika í tí sunnimuslimska økinum, har Saddam Hussein hevði sínar trúgvastu stuðlar, og tað eigur amerikanski almenningurin at fáa at vita, sigur McCain.

Bush-stjórnin hevur fleiri ferðir avsannað, at USA kann koma í somu støðu í Irak sum í Vietnam.



# B-Boys konsert í Føroyum

**Tann 8. novembur verður stór barna- og ungdómskonsert í Norðurlandahúsinum við bólkinum B-Boys úr Danmark. Við á ferðini til Føroya verður Danmarks Radio, sum skal gera eina sending um vælumtókta bólkin**

KONSERT

*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Nú kemur kendi danski ungdómsbólkurin, B-Boys, til Føroya at syngja á eini konsert í Norðurlandahúsinum.

Á konsertini fara eisini føroysk børn og ung at luttaka.

B-Boys gjørdust kendir, tá teir luttóku í Melodi Grand Prix fyri børn og ung í Danmark.

Tað eru teir tríggir, Kåve og Mathias, báðir 13 ára gamlir og 15 ára gamli Sebastian, sum manna B-Boys.

Umframt sangin, eru teir eisini kendir fyri at duga sera væl at dansa, bæði breakdans og hip hop.

Tað eru systkini, Angela Petersen og Mark Joensen, ið skipa fyri konsertini.

Í tíðindaskrivi siga tey bæði, at tey hava tvey aðalmál við konsertini.

Tað fremsta er at menna føroyskan sang og tónleik millum børn og ung.

Annað er, at tað í ár er "Ár teirra brekaðu", og tí ynskja tey at stuðla við at lata eitt møguligt yvirskot av konsertini fara til innsavningina av bussi til búfólkið á Eirargarði.

### Føroysk børn við

- Vit eiga nógv evnarík børn í Føroyum, sum vit ynskja at geva møguleika at hitta barnastjørnur úr hinum norðurlondunum. Samstundis fáa tey møguleika at standa á einum yrkispalli saman við teimum, og tað kann verða við til at føra teirra dreymar út í lívið, siga Angela og Mark.

Føroysku luttakararnir verða Konni Kass úr Hoyvík, Sólfríð Bech av Tvøroyri, Birgit Sivertsen úr Klaksvík, Elin Hansen úr Saltangará og sangbólkurin, Stjørnskot, við Sigrid Sivertsen úr Hoyvík.

Atgongumerki fáast á bensinsølunum kring landið og á Kunningarstovuni í Havn.



*Nú kemur kendi danski ungdómsbólkurin, B-Boys, til Føroya. Saman við føroyskum børnum og ungum skulu teir syngja á eini stórari konsert í Norðurlandahúsinum*




*Atgongumerki til konsertina eru at fáa kring alt landið og kosta 225 krónur. Eitt møguligt yvirskot av konsertini fer til buss til búfólkið á Eirargarði*

